## B36 undirmetir Brøndby

- Ein fyrimunur hjá okkum kann vera, at teir eftir øllum at døma undirmeta okkum. Eg skilji eitt sindur av føroyskum, og út frá almennu dystarfrásagnini á heimasíðu teirra frá fyrsta dystinum, kunnu vit bara siga, at teir undirmeta okkum. Teir kalla okkum fyri eitt teknuseriulið og pylsuátarar. Hermann Haraldsson, stjóri í Brøndby, øtast við í donskum miðlum í gjár. Hann sigur, at B36 undirmetir Brøndby undan dystinum í kvøld. - Teir hildu, at vit spældu vánaligt, og teir skilja ikki, hvussu teir taptu til nakrar pylsuátarar sum okkum. Teir vilja vera við, at tað ikki var verri enn at spæla móti einum liði í teirra egnu kapping. At teir undirmeta okkum á hendan hátt, kann jú gera uppgávuna hjá okkum lættari, sigur íslendingurin millum annað við sporten.dk.

## Jón skal venja TB

Nú er tað greitt, at tað verður veteranurin Jón Johannsen, sum fer at hava ábyrgdina av besta TB liðnum tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum. Suðuroyarportalurin skrivar, at tað á spælarafundi í gjárlvøldi varð greitt, at hetta verður loysnin. Jóan Petur Olgarson, formaður í TB, sigur við Suðuroyarportalin, at teir hava fingið ein 22 ára gamlan dana at royndarvenja tvær tær næstu vikurnar. Hann verður nevndur Sonny og sigst hava spælt í Brøndby, umframt at hann eisini hevur spælt í Ølstykke. Jón Johannesen hevur áður verið venjari hjá TB.



*Í Manchester síggja vit frá vinstru Emmu Joensen, Kirstin Joensen, Ann Tóru Láadal, Jan Djurhuus, Signhild, Djurhuus, Grettir Djurhuus, Óluvu Djurhuus og Sigvald Zachariassen*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Manchester City – EB/Streymur:

# Sorin og Hanus við frá byrjan

**Í Manchester ganga viðhaldsfólkini hjá EB/Streymi spent og bíða til dystin í kvøld, har Sigfríður Clementsen heilt víst fer at fremja tvær broytingar í mun til fyrra dystin móti ensku stjørnunum**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í Manchester er hýrurin góður. Tað er hann eisini nakað uttanfyri Manchester, har hópurin hjá EB/Streymi heldur til.

– Eg haldi ikki eg kann siga annað. Hanus Eliasen gongur framvið mær beint nú, og hann smílist óført, og tað er galdandi fyri hópin sum heild, skemtar Sigfríður Clementsen úr telefonini í Onglandi.

Smílandi eru viðhaldsfólkini hjá EB/Streymi sanniliga eisini. Tað fer at tátta í eini 200 áskoðarar, sum eru komnir fyri at síggja sítt felagslið taka dystin upp við Manchester City. Hesir eru komnir við bussi og flogfari umvegis bæði Danmark og London, og hava hugnað sær í gøtunum í Manchester seinastu dagarnar. Nú ganga tey so spent og bíða eftir, at dysturin verður bríksladur í gongd. Og ikki minst eru tey spent eftir at vita, hvørjar mans Sigfríður Clementsen velur at senda á vøllin í kvøld.

### Hanus fyri Hans Paula

Sjálvur hevur Sigfríður Clementsen longu avgjørt, hvørjir teir eru. Hann sigur seg tó ikki vilja upplýsa hvørjir hesir eru, men lyftir lokinum eitt sindur. – Liðið verður nakað tað sama sum seinast, men vit hava so fingið Sorin aftur, og tað er als ikki óhugsandi, at hann byrjar inni. Hanus Eliasen kann eisini gott koma upp á tal, sigur Sigfríður Clementsen, sum tó ikki sigur nakað um, hvørjir so skulu út.

Greitt er tó, at tað er ógvuliga ivasamt, hvørt Levi Hanssen verður tøkur ella ikki. Hann hevur fingið ein skaða í læri, og tað argar unga havnarmannin nógv. Tískil kemur Sorin helst inn á hansara pláss á miðvøllinum. So er spurningurin, hvar Hanus Eliasen kemur inn. Ein møguleiki er, at Hans Pauli Samuelsen verður tikin út. Hanus Eliasen loysti Hans Paula Samuelsen av í dystinum á Tórsvølli. Tá hevði Hans Pauli helst verið tann leikarin, sum stóð veikastur í myndini hjá EB/Streymi. Har umframt spældi Hanus Eliasen ein branddyst móti B36 undan Manchester-dystinum, og gjørdi tað annars væl, tá hann kom inn á Tórsvølli.

Mikkjal Thomassen er eisini við í hópinum hjá EB/Streymi í kvøld. Tað var hann eisini á Tórsvølli, men tá kom hann ikki á vøllin. Tað ger hann neyvan heldur í kvøld, metir Sigfríður Clementsen.

### Eru væl fyri

Annars eru leikararnir væl fyri, letur Sigfríður Clementsen at.

– Vit hava vant tvær ferðir um dagin í sera góðum umstøðum. Vit búgva væl og alt er sum tað skal vera, sigur Sigfríður Clementsen, sum ikki metir, at óvændu umstøðurnar ávirka leikararnar nakað serligt.

Heldur ikki steðgurin, leikararnir hava havt millum dystirnar báðar, heldur venjarin kemur at ávirka negativt. – Nei, als ikki. Menn høvdu brúk fyri at fáa frí, sigur Sigfríður Clementsen.

### Manchester er nógv betri

Spurdur um, hvørjar vánirnar til dystin í kvøld eru, er Sigfríður Clementsen ógvuliga realistiskur. – Vit vita væl, at Manchester City eru nógv betri enn vit. Og tað er eisini tað, sum vit koma at arbeiða út frá. Tað gjørdu vit eisini á Tórsvølli, og so mugu vit bara taka úrslitið sum tað kemur, sigur Sigfríður Clementsen.